# - HEVÐI VERIÐ LÆTTARI AT VALT 10 TÆR BESTU



**Vit hava biðið Høgna Lisberg um at vejla tær fimm bestu tónleikaútgávurnar, ið hann veit um. Tað eydnaðist at fáa Høgna at svara, men hann viðgekk, at tað hevði verið lættari at valt 10 tær bestu.**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Høgni Lisberg gjørdi fyrstu ferð um seg í eygunum hjá almenninginum, sum orkufullu og delikat sminkaði trummuleikarin, ið saman við bassleikaranum Jens L. Thomsen legði botnin í sermerktu ljóðmyndini hjá Clickhaze. Melankolski rokkurin hjá Clickhaze liggur tó langt frá ljóðinum, ið Høgni legði fyri dagin, tá hann spretti sum singer/songwriter. Men eins og í Clickhaze fangaði einstaklingurin Høgni lurtaran, og longu á fyrstu fløguni vann Høgni sær nógvar fjepparar. Men tað var við fløguni Morning Dew, at Høgni gjørdist heimskendur í heimlandinum. Fløgan varð vald til ársins fløgu á Planet Awards og við fleiri løgum ovast á 15 teimum bestu var Høgni vorðin fólkaogn. Fløgan hevur síðan vakt ans í Íslandi og Danmark, har Høgni nú býr. Hann arbeiðir miðvíst við tónleikinum, og er javnan at síggja á palli í Danmark.

## Lurtaði eftir LP plátunum hjá pápanum

Fyri Høgna hevur tónleikur altíð havt nógv at siga. Hann byrjaði tíðliga at lurta eftir LP plátunum hjá pápa sínum.

- Pápi mín hevur altíð dámt væl at lurta eftir tónleiki, og eg var ikki serliga gamal, tá eg byrjaði at lurta eftir hansara tónleiki, greiður Høgni frá.

- Tá eg var yngri lurtaði eg nógv eftir tónleiki, men tað er vorðið minnið við árunum. Tá tú ert ordiliga ungur blívur tú við at blíva yvirraskaður av tí, sum tú hoyrir. Men tá tú gerst eldri, so sært tú, at tingini endurtaka seg, og kanska dámar tær betur tað upprunaliga. Sjálvt um tað sikkurt hevur uppruna onkra aðrastaðni. Eg ivist ikki í, at fyri t.d. pápa mín er okkurt annað tað upprunaliga.

## Trupult at velja

Høgni eigur eini 400 fløgur, men keypir ikki longur so nógvar fløgur. Nógvar fløgur, sum Høgni veit eru góðar, eigur hann ikki. Men hann viðgongur, at tað var sera trupult at velja tær fimm bestu fløgurnar burturúr øllum teimum, ið hann kennir til.

- Eg noyddist at sálda ymiskt frá, eisini fløgur, sum týða nógv fyri meg, eg havi t.d. ikki Jewel ella Traci Chapman á listanum, tó at útgávur hjá teimum hava nógv at siga fyri meg, ella t.d. Led Zeppelin ella Jethro Tull, sum eiga nakrar av fløgunum, sum eg havi lurta nógv eftir. Stutt sagt er ómøguligt, at gera ein fullfíggjaðan endaligan topp 5 lista. Tað hevði verið lættari at gjørt ein topp 10, men hetta eru løgini, sum eg velji í dag. Kanska hevði eg valt okkurt annað í morgin.

## Jimi Hendrix - The Look Behind Collection



Hetta er ein dupultfløga, ein uppsamling. Eg veit ikki um hon yvirhøvur er autoriserað. Men eg havi lurta ræðuliga nógv eftir henni. Havi altíð dyrkað 60-70 rokk og serliga Jimi Hendrix. Mær dámar ræðuliga væl trummuspælararnar hjá honum. Pápi mín keypti mær fløguna einaferð hann var í Týsklandi og smíðaði. Eg veit ikki um hon er keypt í Týsklandi ella á einum loppimarknaði í Danmark. Eg veit bara at hon kostaði ikki nógv, men eg havi lurta nógv eftir henni.

## Black Sabbath – Paranoid



Tað er ikki so frætt sum, at eg eiga Paranoid á fløgu. Havi mest lurta eftir henni á LP. Hetta var ein av LP'unum hjá pápa mínum, sum eg vaks upp við. Hetta var einasta Black Sabbath LP'in, sum pápi mín átti, og er tann Black Sabbath útgávan, sum eg kenni best. Tað er kanska tí, at hon er mín yndisútgáva hjá teimum. Men av tí, sum eg annars havi hoyrt hjá teimum, er hetta tann, sum fungerar best sum ein samanhangandi útgáva. Eg dyrki hesa útgávuna av somu orsøk sum Jimi Hendrix fløguna, hetta er feitur rokkur. Eg dyrki trummuspælið, fantastiskt trummuspæl.

## Rage Against The Machine - Rage Against The Machine



Eg minnist væl, tá eg fyrstu ferð hoyrdi Rage Against The Machine. Eg eri hálvur vágbingur og ferðaðist nógv til Vágs, tá eg var yngri. Nakrir av teimum sum eg fylgdist við har, vóru farnir at lurta eftir Rage Against The Machine, men eg fataði tað slett ikki. Eg havi nokk verið 13 ár tá. Nøkur ár seinni introduseraði ein vinmaður meg aftur fyri tónleikinum hjá Rage Against The Machine, og eg fór at dáma fløguna. Teir hava eitt sterkt úttrykk, tað dámar mær væl. Eingin ljóðar sum Rage Against The Machine, og eingin ger tað so gott innan fyri handan tónleikin sum teir. Teir hava eitt gjøgnumslag. Hasin insisterandi rapparin, tú hoyrir væl, at hann meinar tað, og hinir sjálvt um teir úttrykkja seg musikalskt á ein annan hátt, so hoyrir tú, at teir eisini meina tað.

## Ben Harper - Fight For Your Mind



Ja, hon er nokkso skeg. Ben Harper er frá tíðini, tá vit vóru byrjaðu í Clickhaze. Jón Tyril var altíð áhugaður í tingum, sum ikki ljóðaðu sum tað, sum man hoyrir í Føroyum. Ben Harper er smánakin, gruvutur tónleikur. Slide gittarin fyllur nógv í bílætinum. Tað er ikki vanligt, at slide gittar fyllur so nógv. Eg var ikki so glaður fyri hesa fløguna í byrjanini. Men Jón vildi hava meg at lurta aftur, so hann brendi mær hana, og tað er hesa brendu fløguna eg havi enn, eg havi ongantíð tikið meg saman til at keypa hana. Eg brenni annars ikki fløgur sjálvur, og havi heldur ikki brendar fløgur. Men hendan er øgiliga nostalgisk. Okkurt hendi, tá hann brendi hana, so tað er eitt skróv millum hvønn sang. Mær fór at dáma hana væl og Ben Harper gjørdist eitt samlingspunkt í Clickhaze.

## Joan Osborne - Relish



Relish er ein av mínum absoluttu yndisfløgum. Eg dyrki hesa fløguna. Eg havi hoyrt annað hjá Joan Osborne, men tað er ikki áhugavert. Men eg eri forelskaður í ljóðbílætinum á fløguni. Joan syngur flott og útrykksfult. Ikki øll løgini eru fantastisk, men eg haldi, at tey øll eru góð. Hetta er ein fløga, sum eg kann lurta eftir umaftur og umaftur. Hon ljóðar ræðuliga væl. Hon svingar so væl. Joan Osborne hevur feitar tónleikarar við sær á fløguni. Eg haldi, at summir av teimum eru nokkso viktig fólk.

Eg keypti Relish tí, at lagið One Of Us var á henni, og eg dyrkaði hetta lagið. Men fløgan er vaksin við árunum. Á fløguni spælir Joan Osborne eina útgávu av lagnum Man In A Long Black Coat hjá Bob Dylan. Hetta lagið spældu vit eisini í Clickhaze.

5 tey bestu

Høgni Lisberg velur tær fimm bestu útgávurnar